# – Vit eru ein sjálvsagdur partur av kirkjuni

**Felagið fyri Kirkjuráðslimir hevði aðalfund leygardagin. 10 ár eru liðin síðani felagið varð stovnað, og hesi árini hevur tað ment seg til ein týðandi part av kirkjuliga landslagnum**

KIRKJURÁÐ
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*
*Myndir: Trúboðin*

**Argir:** »Dugir hin siðiligi, nærlagdi, ólønti og kirkjuelskandi kirkjuráðslimurin ikki at handfara eina hugsan, sum ikki er í trá við hansara egnu, uttan at fáa ta fatan, at her er talan um fíggindskap?«

Soleiðis talaði Gunnvá Mortensen, sála av Argjum í apríl mánaði 1995 frammanfyri stórari mannfjøld. Kallað varð saman til fund at fyrireika stovnan av landsfelagi fyri teir mongu kirkjuráðslimirnar í landinum.

Líkt varð til, at fólk tóku hesa vælorðaðu røðu hennara í álvara, tí stutt eftir varð felagið veruleiki, og kann nú hátíðarhalda at 10 ár eru liðin síðani stovnanna.

Leygardagin var aðalfundurin hildin í Kirkju- og Missiónshúsinum á Argjum. Her greiddi formaðurin, Edvin Joensen frá um virksemið í felagnum hetta seinasta árið.

Umframt kirkjuráðslimir úr øllum landinum vóru eisini útlendskir gestir bodnir við á fundin, m.a. danin Kurt Johansen, sum greiddi frá teirri kristnu sjónvarpsrásini SAT-7, sum sendir sjónvarp til tann arabiska heimin 24 tímar um samdøgrið.



*Felagið fyri Kirkjuráðslimir hevur hesi 10 árini ment seg til ein sjálvsagdan og týðandi part av kirkjuliga landslagnum í Føroyum, sigur Edvin Joensen, formaður í felagnum*

### Hækkaður kirkjuskattur

Í ársfrágreiðing síni vísti Edvind Joensen á fleiri mál, sum høvdu verið til umrøðu í felagnum síðani aðalfundin í fjør.

Eitt av hesum mál var lógararbeiðið í sambandi við yvirtøkuna av fólkakirkjuni. Her hevur ein fylgibólkur verið á tveimum fundum við nevndina, sum ger hetta lógararbeiðið.

Eitt mál í hesum sambandi var ásetingin av kirkjuskattinum. Felagið vísti á, at trupult var hjá kirkjuni at liva við verandi hámarki fyri kirkjuskattin, og ynskti felagið tí at hetta varð hækkað.

Eftir fleiri viðgerðir og fundir, eisini við táverandi danska kirkjumálaráðharran, Tove Fergo eydnaðist tað at fáa í lag eina kongaliga fyriskipan við hesum. Henda fyriskipan kom í gildi á nýggjárinum, og tí er hámarkið fyri kirkjuskattin nú sett til 0,4%.

– Hetta gevur okkum 5 mió. kr. meiri í kirkjuskatti um árið, staðfesti Edvin Joensen. Hann metti eisini, at ein kundi liva við hesum, til tær nýggju lógirnar koma í gildi.

### Málgagn

Eitt felag við so nógvum limum hevur eisini brúk fyri einum málgagni, sum limirnir kunnu kalla sítt egna.

– Tað er ofta neyðygt at skifta orð um mál av felags áhuga. Mong aftra seg at brúka almennu fjølmiðlarnar at viðgera mál, ið tey meta sum innanhýsis. Tí verður orðaskiftið ikki altíð tað, sum tað átti at verið, sigur Edvin.

Fyrr kom út eitt blað við heitinum »Kirkjutíðindi"«, men tað eru longu fleiri ár síðani at tað kom út seinast. Nú hevur felagið, saman við Prestafelagnum tikið stig til at fáa blaðið útaftur. Ætlanin er, at Kirkjutíðindi skal vera málgagn hjá fólkakirkjuni, og skal nýtast til orðaskifti og upplýsing um kirkjulig viðurskifti.

– Vit meta, at felagið hesi 10 árini hevur ment seg til ein sjálvsagdan og týðandi part av kirkjuliga landslagnum í Føroyum. Og tí er tað ein gleði fyri okkum, nú blaðið er komið út aftur.

– Okkara vón er, at blaðið kemur at vera tí kirkjuliga arbeiðinum at gagni, sigur Edvin Joensen, og hann upplýsir, at ætlanin er at fáablaðið út fýra ferðir um árið.



*Á fundinum vóru eisini bodnir gestir úr Danmark – í miðjuni Kurt Johansen, sum íðin greiddi frá kristnu sjónvarpsrásini SAT-7, sum sendir til arabiska heimin alt samdøgrið*

## Vegdagføringin gongur framá

**Streymnes:** Arbeiðið við at dagføra vegastrekkið millum Streymnes og Brúnna um Streymin gongur alsamt framá.

Talan er um eitt 2,2 km. langt strekki, ið skal dagførast. Ætlanin er eisini at dimensjonera svingið sunnanfyri brúnna Streymoyarvegin, soleiðis at til ber at koyra við 80 km/t. uttan trupulleikar.

Teir hava higartil grivið av og grovplanerað tann størra partin av vegastrekkinum. Einki verður sagt um, nær arbeiðið verður liðugt, men kostnaðurin er mettur til 1 mió. kr.

**sb.**

## Bill fagnar tjøldrunum

**Runavík:** Eins og so manga aðrastaðni verður eisini skipað fyri grækarismessuhaldi í Runavík leygardagin.

Haldið verður á Torginum og byrjar kl. 14. Løgtingsmaðurin, Bill Justinussen fer at halda røðu og hornorkestrið í sóknini spælir. Í sambandi við tiltakið fara skótarnir at ganga skrúðgongu.

**sb.**

## Vinnuøki til smærri fyritøkur

**Havn:** Nú ber eisini til hjá smærri fyritøkum at ogna sær eitt vinnuøki í Tórshavnar kommunu.

Tey vinnuøki, sum kommunan hesi seinastu árini hevur kunnað boðið áhugaðum vinnufyritøkum, hava verið rættiliga stór. Nakrar 1000 fermetrar hvørt, og harvið ov kostnaðarmikil til smærri vinnufyritøkur.

Nú fyrsta útstykkingin á Skarðshjalla er liðug, hevur býráðið gjørt av, at bjóða smærri virkjum og fyritøkum eitt 18.000 fermetra stórt øki, júst eftir tí tørvi, tey hava.

Heðin Mortensen, borgarstjóri sigur, at kommunan hevur bæði umsóknir og fyrispurningar um tílík vinnustykki liggjandi.

– Tí verða hesi øki nú boðin út, so kommunan kemur at kenna veruliga tørvin. Tá kommunan hevur fingið umsóknirnar frá teimum, sum hava áhuga í einum tílíkum stykki, verða hesi lutaði í ynsktu støddirnar, sigur hann.

**sb.**

# Tobbi stuðlar teimum heimleysu

**Leygardagin verður stuðulskonsert fyri tað arbeiðið, sum Frelsunarherurin ger fyri tey heimleysu í Føroyum**

HJÁLPARARBEIÐIÐ
*Snorri Brend*

**Strendur:** Hóast tey ikki rópa so hart upp um tað, so er eingin ivi um virðið í tí arbeiðinum, sum Frelsunarherurin ger her á landi.

Eitt av hesum arbeiðum er millum tey heimleysu á Havnargøtum, sum ikki eiga eina ordiliga song at leggja seg til hvíldar í, tá dagurin er lokin.

Hesa støðuna hevur Frelsunarherurin tikið til sín, og hevur í mong ár rikið eitt stórt hjálpararbeiði, m.a. út frá »Herberginum« miðskeiðis í Havnini.

Til eitt slíkt arbeiði krevst sjálvandi peningur. Og nú leygarkvøldið fáa strandingar og onnur fólk høvi at geva sítt íkast til hetta arbeiðið. Tá verður nevniliga skipað fyri eini stuðulskonsert við fólki, sum eisini eru kend fyri annað enn sang, m.a. løgtingsmaðurin Torbjørn Jacobsen.

### Óskerdur peningur

Fyrireikararnir til hetta tiltakið hava fingið Bygdarhúsið á Strondum til konsertina leygarkvøldið, sum byrjar kl. 20.

Tey hava sjálvandi eisini fingið fimm bólkar og einstaklingar at luttaka við konsertina.

Umframt Tobba fara eisini Lív Hansen og Kenneth Hansen at luttaka, og Knút Háberg Eysturstein, sum í fjør gav út eina fløgu, sum fekk góð ummæli.

Ungdómsbólkurin hjá Frelsunarherinum fer eisini at luttaka, umframt tríggir mans við navninum Súni, Hanus og Ingolf.

Á konsertini verður eisini kaffi og køkur at fáa. Og lagt verður aftrat, at allur tann innkomni peningurin fer óskerdur til hjálpararbeiðið fyri tey heimleysu.